gult15 cyan15 magenta15 svart15

ítróttur

Nr. 156 • hósdagur • 16. august 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Sasja aftur til TB

Seinast Sasja spældi í Føroyum, skeyt hann 11 mál í 13 dystum fyri GÍ

Álopsmaðurin skuldi ætlandi verið alla seinnu kappingarhálvu, men trupulleikar eru við at fáa neyðugu pappírini úr Danmark

2. DEILD
Jákup Mørk

Tvørámenn hava ikki staðið seg so væl, sum teir sjálvir høvdu vónir um, tá farið varð í holt við landskappingina. Eftir eina sera ringa byrjan, hava teir tó spakuliga fingið ferð á, og eru teir í løtuni næstfremst av teimum liðum, sum stríðast um at flyta upp til bestu deildina.

Í royndunum at styrkja um møguleikan fyri einari uppflytan, hevur felagið eisini leitað sær styrk uttanlands, og avtala er fingin í lag við ein gamlar kenning, sum áður hevur skotið nógv mál fyri tvørámenn.

Talan er um jugoslaviska áleyparan, 29 ára gamla Sasja Radosavljevic, sum í 1997 og 1998 spældi við TB, har hann bæði árini var greiður toppskjútti. Í 1999 spældi Sasja við GÍ, har hann í 13 dystum gjørdi 11 mál.

Seinkað

TB hevur sum sagt fingið avtalu við leikaran, og eisini viðvíkjandi FSF og øðrum føroyskum myndugleikum er alt fingið í rættlag.

Trupulleikin er tó, at enn er pappírsarbeiðið viðvíkjandi uppihalds- og innferðarloyvinum ikki avgreitt í Keypmannahavn.

Sum skilst, er nú liðin meira enn ein mánaði síðani, at umsóknin varð latin inn, og høvdu tvørámenn ætlað, at Sasja skuldi verða tøkur alla seinnu kappingarhálvu, men hetta varð so av ongum.

Mist vónina hava teir tó ikki, og nú verður bíðað við spenningi, um Sasja verður tøkur at spæla leygardagin, tá TB skal royna seg móti GÍ

Nýtt met um Nólsoyarfjørð

Dia Jacobsen setti nýtt met um Nólsoyarfjørð, tá hann svam undan átta øðrum svimjarum og við tíðini 1.20.27 steig á land í Nólsoy.

FJARÐASVIMJING
Tíðindaskriv

Tíðliga leygarmorgunin hittust niggju svimjarar í húsunum hjá radioamatørunum yviri við Strond. Tvær kvinnur og sjey mans ætlaðu sær í ár at bjóða Nólsoyarfirði av í kappingini at svimja teir fýra kilometrarnar út til Nólsoyar.

Væl var fyriskipað og beint fyri klokkan hálvgum tíggju var alt klárt. Eftir at myndutøkurnar vórðu lidnar, løgdu svimjararnir so til brots oman fjøruna.

Hjálparbátarnir lógu longu til reiðar og fólk savnaðist uppi á vegnum at hyggja at. Formansbáturin skeyt startin og svimjararnir lupu á bláman. Skjótt var at finna fram til egnan bát og so hildu tey avstað.

Veðrið var hampiligt, og tó at svimjararnir kanska høvdu ynskt sær heldur slættari sjógv so var skjótt at meginparturin var á hálvum fjørðinum.

Tey níggju, sum leygarmorgunin løgdu til brots um Nólsoyarfjørð, eru her avmyndað beint undan startinum

Seks svimjarar vunnu fram á heiðursportrið í Nólsoy, og fyrstur á land var Dia Jacobsen við nýggjum meti. Gunnar Dahl Olsen var heldur norðaliga á oynni har ov torført var at sleppa á land, og fór hann tískil í bátin.

Dia Jacobsen,	1.20.27
Bogi Lenvig,	1.35.16
Erlendur Simonsen,	1.47.17
Kári Simonsen,	1.50.10
Gunnar Waagstein,	1.58.06
Rannvá Jacobsen,	2.13.24
Tommy Andreasen,	-
Katrin Sørensen,	-
Gunnar Dahl Olsen,	-

Sigast kann at svimjingin um Nólsoyarfjørð nú er vorðin føst kapping í sambandi við Ovastevnuna. Hetta er ógvuliga náttúrligt, tá ið hugsað verður um at stevnan verður fyriskipað, at fáa til vega svimjihylin, ið Ove Joensen lovaði nólsoyingum.

Stuðulsfelagið ynskir at takka Suðuroyar Sparikassa, Føroya Bjór, MBM og Fotobúðini fyri teirra stuðul í svimjingini 2001. Somuleiðis verður takka svimjarunum og hjálparfólkunum fyri teirra leiklut og at enda øllum ið hjálptu svimjarunum væl upp á land.

Tvey talv frá landsdystinum

Hesaferð eru vald tvey talv frá landsdystinum millum Føroyar og úrvalsliðið úr Íslandi, sum Føroyar ruddiliga vunnu 14,5 - 5,5. Rani Nolsøe vinnur eitt gott vælleikt positionelt talv, meðan Torkil Nielsen vinnur sítt talv í eyðkendum stíli.

Rani Nolsøe (2180) – Tór Valtysson (2095)
Landsdystur. Føroyar – Ísland. (4. borð)

1.e4 c6 2.d3 (Rani hevur sett sær fyri at telva positionelt við hvíta fólkinum, ístaðin fyri tann meira álopskenda stílin hjá honum. Eitt gott val henda dagin) 2...d5 3.Fe2 dxe4 4.dxe4 e5 5.Rif3 Rif6 6.g3 h6 7.Bg2 Bg4 8.0-0 Ribd7 9.Ribd2 Bc5 10.h3 Be6 11.b3 a5 12.Bb2 Fc7 13.Ric4 Bxc4 14.Fxc4 b5 15.Fe2 0-0 16.Rih4 Rfe8 17.Kh1 Bf8 18.c3 a4 19.Rif5 g6 20.Rie3 a3 21.Bc1 Rib6 22.Ric2 Rih5 23.Kh2 Kh7 24.Be3 Rig7 25.Rad1 Rad8 26.f3 (Gevur pláss fyri eitt nú frúnni á f2. [26.f4 er eisini væl møguligt] 26...Rie6 27.h4 Rxd1 28.Rxd1 Rd8 29.Bh3! (Har er bispurin væl staddur) 29...Rxd1 30.Fxd1 Ric5 31.Bc1 (Ein finna er ein finna_) 31...Rib7 32.Bxa3 Bxa3 33.Rixa3 Fe7 34.Ric2 Fc5 35.Fd2 Kg7 36.Bf1 Fe7 37.Rie3 Ff6 38.Kg2 Fe7 39.h5 Fc5 40.hxg6 fxg6 41.Rig4 g5 42.Rie3 Kg6 43.Rif5 Ff8 44.Be2 (Svarti riddararnir eru ikki nógv verdir í støðuni) 44...Fe8 45.f4! (ein fella) 45...exf4? (Støðan er tó kortini tapt hjá svørtum)

46.Bh5+! (Kxh5 Rig7+ og frúgvin rýkur) 1-0
Torkil Nielsen (2075) – Viðar Jónsson (1925)
Landsdystur. Føroyar – Ísland (6. borð)

1.e4 e5 2.Rif3 Ric6 3.Bb5 d6 4.d4 Bd7 5.0-0 Rif6 6.Ric3 exd4 7.Rixd4 Rixd4 8.Fxd4 Bxb5 9.Rixb5 a6 10.e5 axb5 11.exf6 gxf6 12.Re1+ Kd7 13.Fd5 b6 14.Fxb5+ c6 15.Fh5 c5 16.Fxf7+ Kc6 17.c4 h5 18.Bf4 Rc8 19.Rad1 Fd7 20.Fd5+ Kc7 21.Re6 Rd8 22.Rxf6 Be7 23.Rf7 Rhe8 24.Bg5 Rc8 25.h3 Kb8 26.Re1 Rc7 27.Rfxe7 Rxe7 28.Rxe7 1-0

VB riggar til

Regina Radó verður triðja árið á rað við VB, sum ivaleyst fer at miðja hægri enn eftir bronsumerkjunum, sum tær vunnu í fjør

Hondbóltskvinnurnar í Vági ætla eftir øllum at døma framhaldandi at hava ein leiklut í oddinum

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Hondbóltskvinnurnar úr Vági hava seinnu árini ota seg alsamt nærri føroysku hondbóltstindunum, men enn hava tær ikki rokkið heilt fram í oddin. Tvær taptar steypafinalur og eitt bronsumerki hevur verið úrslitið tey bæði seinastu árini, men hetta tykist á ongan hátt at hava tikið mótið frá teimum.

Ungverskur venjari

Hesi bæði árini hevur VB-liðið verið styrkt við Regina Radó úr Ungarn, umframt at landskvinna hennara, Andrea Lütz, sum varð kosin ársins álopsleikari, spældi við seinasta vetur.

Úr Vági frættist, at Andrea nú er sloppin á ítróttarskúla í Budapest, og at hon ongantíð aftur fer at hava tíð til at venja við Vági.

VB hevur nevnliga gjørt avtalu við ein ungverskan venjara, og ætlanin er so, at kona hansara, sum eisini kemur til Føroya, skal spæla við besta kvinnuliðnum. Møguliga verður talan eisini um ein triðja útlendskan leikara, men hetta er so ikki endaliga greitt enn, skilst úr Vági.

Sterkari hópur

Sostatt er líkt til, at VB í øllum førum heldur fast um tilfeingið, sum liðið hevði í fjør, og ivaleyst verður hópurin eisini sterkari. VB var nevnliga sera óheppið við skaðum seinasta kappingarár. Sólrun Krosslá misti at kalla alt kappingarárið við einum brotnum armi, meðan Rannvá eisini misti stóran part við brákaðum handliðið. Arnleyg Krosslá hevði burðarfarloyvi, meðan Christina Holm spældi við Kyndli fyrru kappingarhálvu.

Verða allar hesar tøkar frá kappingarbyrjan, umframt at hópurin annars verður varðveittur, er einki at ivast í, at VB komandi árið fer at teljast millum mest uppløgdu kappingarneytarnar hjá VÍF í stríðnum um FM-gullkrónurnar.

Skála kærir

Skálamenn hava latið kæru inn viðvíkjandi dystinum móti HB sunnudagin

KÆRA
Jákup Mørk

Skálamenn, sum størsta partin av árinum hava verið í oddinum í aðru deild, mistu eitt stórt fet í so máta, tá teir sunnudagin taptu 2-0 fyri HB.

Nú er tó kortini møguleiki fyri, at Skála kann vinna sær trý stig fyri dystin, tí Skála hevur nevnliga latið FSF kæru, har teir vísa á, at HB hevur nýtt tveir ólógligar leikarar.

Talan er um teir báðar, Hall Danielsen og Johannis Færø, sum báðir høvdu spælt við á besta HB liðnum vikuna frammanundan. Reglurnar siga, at skal leikari flyta eina deild niður, skal hann leypa dyst um hjá liðnum í ovaru deildini, men tá dysturin millum HB og GÍ í fyrstu deild er fluttur, var eingin dystur at leypa um.

Sum skilst, hildu teir í HB seg hava rætt at nýta leikararnar, men á Skála eru tey ikki í iva um, at tey hava grein í sínum máli.

Todi Jónsson er nú aftur byrjaður at spæla dystir fyri FCK

Todi við aftur

Týskvøldið leiktu eykamenninir hjá FCK, tað sonevnda Ørestadsliðið, dyst móti eykamonnunum hjá Køge og Herfølge.

Sjálvt úrslitið av dystinum, 1-0 ti Køge/Herfølge, er helst ikki so áhugavert í sjálvum sær, men hinvegin var hetta fyrsta ferðin í hesum kappingarárinum, at Todi Jónsson royndi seg í dysti fyri FCK.

Todi spældi fyrstu trý korterini, og sambært heimasíðuni hjá FCK gekk hetta væl.

- jm